# Marita var merkiskvinna

**Marita Petersen var ein merkiskvinna og ein framúr góður starvsfelagi. Hon var heil, og hon var sterk, har hon var. Sera virkin og sera nærløgd i øllum tí, hon fekst við. Soleiðis minnist Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins, Maritu Petersen**



*Við stoltleika, styrki og nærlagni loysti Marita uppgávurnar, og vann sær sjálvum og løgmansembætinum stóra virðing bæði her heima hjá okkum og uttanlands, og tað eiga vit allir føroyingar at vera henni takksamir fyri, heldur Jóannes Eidesgaard, formaður Javnaðarfloksins*

ANDLÁT

Marita Petersen okkara fyrrverandi løgmaður og okkara fyrrverandi løgtingsformaður er farin bert 60 ára gomul. Men fyri okkum í Javnaðarflokkinum var hon harumframt eisini okkara fyrrverandi formaður og starvsfelagi. Mær untist at starvast saman við Maritu bæði í Tinganesi og í Løgtinginum í nøkur ár, og kann eg tí av røttum siga, at hon var ein merkiskvinna og ein framúr góður starvsfelagi. Hon var heil, og hon var sterk, har hon var. Sera virkin og sera nærløgd i øllum tí, hon fekst við. Umframt at hon lagaði nýggjar glæsiligar varðar í kvinnupolitisku søguni, so var hon fyrst og fremst politikkarin framum aðrar, sum vildi nakað. Hon hevði eitt sera sterkt hugsjónaligt grundstøði, sum hon bygdi allan sín politikk á. Og hon vildi framá, og var hon eisini politkkarin, sum tók stig til at fáa eina nýggja stýrisskipan, sigur formaður Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard.

Marita Petersen sat sum fremsti politikkari okkara í svárastu krepputíð, hetta samfelag hevur upplivað. Og hetta var sanniliga ikki bara sum at siga tað. Ein kreppa fyri og onnur eftir var dagligi kosturin í hennara løgmanstíð. Men við stoltleika, styrki og nærlagni loysti hon uppgávurnar, og vann sær sjálvum og løgmansembætinum stóra virðing bæði her heima hjá okkum og uttanlands, og tað eiga vit allir føroyingar at vera henni takksamir fyri. Hon var av sonnum við til at leggja lunnar undir nýggjar tíðar og nýggjar møguleikar í Føroyum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Føroya Javnaðarflokkur sendir Kára og synunum við familjum okkara samkenslukvøðu, nú tit øll hava mist eina sterka konu, mammu, vermammu og ommu.

Føroya Javnaðarflokkur lýsir í takksemi og virðing frið yvir minni um okkara fyrrverandi formann og starvsfelaga Maritu Petersen.

# Hon stóð sum ein maður



**– Marita Petersen var ein sterkur politikari og ein stór persónsmenska. Hon hevði ótrulig evni at samráðast og at fáa úrslit burturur, sigur floksfelagi hennara, Vilhelm Johannesen**

*– At stýra ímillum skerini tey ringastu kreppuárini í Føroya søgu, og sleppa heilskapað burturúr tí, er eitt avreksverk í sær sjálvum, men tað megnaði Marita Petersen, sigur Vilhelm Johannesen um hana*

ANDLÁT

*Áki Bertholdsen*

–Við Maritu Petersen hava vit mist ein sterkan politikara og eina stóra persónsmensku. Hon var ein politikari, sum skrivaði søgufleiri ferðir.

Vilhelm Johannesen, løgtingsmaður fyri javnaðarflokkin er ein av teimum, sum hava havt sera nógv samstarv við Maritu Petersen.

Tað kom líka dátt við hjá honum, sum hjá flest øllum øðrum, at fáa deyðsboðini av Maritu sunnukvøldið.

Hann visti, at hon var sjúk, men hann grunaði ikki, at tað skuldi ganga so skjótt.

So mikið fegnari er hann um, at hann fekk í lag at vitja hana á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn, tá ið hann var niðri í ørindum fyri 14 døgum síðani.

–Tá prátaðu vit um leyst og fast og tað var eyðsæð, at Marita fylgdi væl við tí, sum hendi í Føroyum, hóast hon var sjúk. Hon var prátingarsom og í góðum lag og tá var tað onki sum fekk meg at hugsa um, at her var eitt menniskja, sum lá til tað síðsta.

## Skrivaði søgu – fleiri ferðir

Vilhelm Johannesen sigur, at í politikki var Marita Petersen sterk og dugnalig.

– Tað fall henni í lut at gerast Føroya Løgmaður í 1993 og 1994, sum vóru ringastu kreppuár í Føroyum nakrantíð.

– Hesi árini vísti hon, hvør dugur var í henni. Hon stóð sum ein maður, bæði í politikkinum innanlands, men ikki minst eisini í teimum truplu samráðingunum við donsku stjórnina hesi árini um stórmál og krepuloysnir, sum fingu avgerðandi týdning fyri framtíð Føroya.

Hyggja vit í bakspegilin haldi eg, at hon megnaði tær tíðirnar avbera væl.

– At stýra ímillum skerini hesi kreppuárini, og koma heilskapað ígjøøgnum, var eitt avreksverk í sær sjálvum.

Hvussu fralík samráðingarevni hon hevði, sóu vit eisini eftir valið í 1994, tá ið javnaðarflokkurin hevði truplar og drúgvar samráðingar við Sambandsfokkin og Verkamannafylkingina um at skipa samgongu, men eisini tær samráðingarnar, fekk hon undir land.

Vilhelm Johannesen sigur, at tær samráðingarnar standa klárt í minninum, tí hann hevur oftani síðani hugsað um, hvussu hegnisligt tað var at fáa tað samgonguna snikkaða saman.

Hon var eisini landsstýrismaður í undirvísingarmálum, áðrenn hon varð Løgmaður og eisini í tí starvinum arbeiddi hon væl og miðvíst.

Í Føroyskum politikki skerst ikki burtur, at eitt av hennara stóru avrikum er nýggja stýrisskipanarlógum, sum er hennara verk. Hon kom í gildi í 1995, tá ið vit fingu nýmótans stýrisskipan ístaðin fyri tað avoldaðu, sum var heilt frá 1948 og sum ikki kundi brúkast sum grundarlag undir einum stýri í einum framkomnum samfelag.



*– Marita Petersen var ein politikari og eitt menniskja, sum hevur gingið á odda í nógvum viðurskiftum. Hvør dugur hevur verið í henni, hevur hon víst við tað, at hon bleiv søgulig, ikki bara eina ferð, men heilar fýra ferðir, sigur Vilhelm Johannesen*

Umframt at vera virkin í Løgtingið og Landsstýrið, tók Marita virknan lut í politikki í javnaðarflokkinum eitt langt lív, bæði áðrenn, hon var vald á ting og eisini eftir valið í 1998, tá ið hon gjørdi av ikki at stilla upp aftur.

– Hon hevur verið javnaðarfólk og tað sermerkti hana í øllum hennara politiska virki, tí ehg haldi, at vit kunnu siga, at hon hevði tann minni menta við í huganum í øllum hon tókst við.

– Hon hevði eisini ein eyðkendan vilja til at røkka málum og tí var tað ikki undarligt, at Marita bleiv ein politikari, sum skrivaði søgu, ikki bara einaferð, men fleiri ferðir.

– Hon er fyrsta og einasta konufólk, ið hevur verið Føroya Løgmaður, Løgtingsformaður og formaður fyri einum politiskum flokki í Føroyum. Hon var eisini fyrsta konufólk, sum bleiv formaður í Føroya Lærarafelag. Soleiðis hevur hon skrivað søgu, ikki bara eina ferð, men heilar fýra ferðir, sigur Vilhelm Johannesen.

Men hann minnir á, at Marita Petersen var ikki bara politikari. Hon hevði eisini eitt privatlív og hitti tú hana privat, var skjótt at tú varnaðist, at hon var bæði vitandi, hugnalig og skemtingarsom at práta við.



# Marita er ein fyrimynd

**– Marita Petersen hevur víst, at tað ber til hjá kvinnum at vinna fram í politikki, sigur Turið Debes Hentze, forkvinna í Javnstøðunevndini**

KVINNURØRSLA

*Eyðun Klakstein*



*– Kvinnur hava brúk fyri fyrimyndum, og tað hevur Marita verið. Hon hevur havt nakrar eginleikar, sum gjørdu hana til løgmann í Føroyum, og hetta er nakað, sum kvinnur kunnu síggja upp til, sigur Turið Debes Hentze*

Marita Petersen er einasta kvinna, sum hevur verið løgmaður í Føroyum. Hon tók í 1993 við í starvinum, sum frammanundan var og síðani hevur verið ein mannfólkastarv.

– Tað hevur stóran týdning fyri kvinnur og kvinnurørsluna, at vit hava havt ein kvinnuligan løgmann. Marita hevur prógvað, at tað ber til hjá kvinnum at vinna fram í politikki, hóast tær mangan hava verið einsamallar, sigur Turið Debes Hentze, sum er forkvinna í Javnstøðunevndini.

– Kvinnur hava brúk fyri fyrimyndum, og tað hevur Marita verið. Hon hevur havt nakrar eginleikar, sum gjørdu hana til løgmann í Føroyum, og hetta er nakað, sum kvinnur kunnu síggja upp til.

## Slóðað fyri

Turið Debes Hentze heldur, at Marita Petersen hevur gjørt vart við leiklutin hjá kvinum í føroyskum politikki.

– Hon hevur prógvað bæði mótvegis kvinnum og monnum, at ein kvinna kann saktans sita sum løgmaður, sigur hon.

– Hon hevur slóðað fyri sum higartil einasti kvinnuligi løgmaður, men vónandi er hon ikki tann seinasta, sum hevur røkt hetta starv, sigur Turið Debes Hentze.

Ása Ellefsen:

# – Eg fari at sakna hana

**– Marita var arbeiðssom, alítandi og sera dugnalig til sítt fak, sigur Ása Ellefsen, sum hevur starvast nógv saman við Maritu og kent hana frá ungum árum**

STARVSFELAGAR

*Eyðun Klakstein*



*– Marita var humoristisk og stuttlig at verða saman við. Eg havi alt gott at bera henni, sigur Ása Ellefsen, vinkona og starvsfelagi*

Marita Petersen og Ása Ellefsen vóru júst farnar undir nýtt samstarv, nú Marita gjørdist sjúk og doyði. Tær skuldu í felag virka sum privatpraktiserandi psykologar, og ætlanin var eisini at granska.

Men áðrenn hetta liggja nógv ár sum vinkonur og starvsfelagar – millum annað á Sernámsdeplinum.

– Marita var arbeiðssom, álítandi og sera dugnalig til sítt fak. Hon var humoristisk og stuttlig at verða saman við. Eg havi alt gott at bera henni, sigur Ása Ellefsen.

Ása og Marita gingu á studentaskúla saman, og tær vóru eisini niðri og lósu um somu tíð. Seinni fluttu tær aftur til Havnar, kendust, gingu í bindiklubba saman og arbeiddu saman.

– Eg havi kent Maritu, síðani eg var 16 ára gomul, so tað verður ein sera stórur saknur, nú hon er farin, sigur Ása Ellefsen.

Lisbeth Petersen:

# – Marita var ein virðiligur politikari

**– Marita Petersen var ein politikari, sum tú kundi hava virðing fyri, sigur Lisbeth Petersen, sum hevur sitið á tingið saman við Maritu**

LØGTINGSKVINNUR

*Eyðun Klakstein*



– Marita Petersen var ein góður politikari. Hon helt fast um síni prinsipp, men hon vildi gjarna kjakast um tey.

Hetta sigur Lisbeth Petersen, sum hevur arbeitt saman við Maritu í løgtinginum.

– Marita var ein politikari, sum eg hevði virðing fyri, hóast vit ikki altíð vóru samdar um tey ymsu málini. Vit arbeiddu eisini saman í øðrum samanhangi, og har havi eg eisini alt gott at bera henni.

Lisbeth Petersen heldur, at Marita Petersen dugdi væl at verða løgmaður.

– Hon var ein virðiligur politikari, sigur Lisbeth Petersen.

Jógvan við Keldu:

# – Hon var ein statskvinna

**– Tað undraði meg als ikki, at Marita Petersen gjørdist Føroya fyrsti kvinnuligi løgmaður, sigur Jógvan við Keldu, sum sat í Norðurlandaráðnum saman við henni**

STATSKVINNA

*Eyðun Klakstein*



*– Marita Petersen bar stórar byrðar fyri alt Føroya fólk í eini torførari krepputíð, sigur Jógvan við Keldu*

Seinast í áttatiárunum sótu Jógvan við Keldu og Marita Petersen saman í Norðurlandaráðnum, og fólkafloksmaðurin fekk stóra virðing fyri javnaðarkvinnuni.

– Eg legði beinanvegin merki til, at hon hevði gott samband við tey fólkini, sum hon umgekk, og hon var altíð væl inni í teimum ymsu málunum, sigur Jógvan við Keldu.

– Longu tá bar hon seg at sum ein statskvinna, og tað undraði meg als ikki, at hon seinni gjørdist Føroya fyrsti kvinnuligi løgmaður.

## Hørð tíð

Jógvan við Keldu heldur, at Marita Petersen hevði tunga uppgávu sum løgmaður.

– Tá eg í Útvarpinum í morgun fekk boðini um, at hon var farin, segði eg, at nú hugsa allir føroyingar. Og tað sum kom mær fyrst í huga var tann harða løgmanstíðin, sum Maria hevði. Hon bar stórar byrðar fyri alt Føroya fólk í eini torførari krepputíð.

– Eg tosaði við Maritu fyri stuttari tíð síðani, og tað harmar meg, at hon er farin í góðum árum. Í dag leita mínir tankar til familju hennara, sigur Jógvan við Keldu.

# Marita Petersen til áminningar



Tað vóru sorgarboð, ið bórust okkum, tá vit mánadagin komu til arbeiðis, at fyrrverandi leiðari okkara í Sernámsdeplinum, Marita Petersen, var deyð. Við deyða hennara hevur føroyska skúlaverkið og serliga tann parturin, ið fevnir um serundirvísing verið fyri dygg-um missi.

Við støði í lærarayrkinum fekk Marita sær útbúgving sum psykologur við DLH. Við hesi útbúgving gjørdist hon leiðari av Sernámsfrøðiligu Ráðgevingini í Føroyum og seinni leiðari av Sernámsdeplinum. Eitt starv hon røkti við umhugsni og kærleika til februar í ár, tá hon saman við øðrum starvsfelaga fór undir praktiserandi psykologarbeiði. Eitt arbeiði ið m.a. skuldi fevna um skráseting av næmingum við asberger syndromi í føroyska skúlanum í tøttum samstarvi við lærda háskúlan í Upsala.

Sum starvsfelagi var Marita nærløgd og ágrýtin. Hon hevði ein brennandi alsk til teir veikastu næmingarnar í fólkaskúlanum, ið hon nýtti alla sína orku til at geva eina mannsømiliga skúlagongd. Tí harmaði tað hana almikið, at fíggjarligu karmarnir fyri hesum mannarætti gjørdust trengri og trengri, so næmingurin við serligum tørvi gjørdist taparin.

Fyri okkum í Sernámsdeplinum kennist saknurin nívandi. Vit hava mist ein starvsfelaga og vin, sum við áhuga fylgdi hvørjum einstøkum okkara. Marita var kveikjandi og eggjandi í tí dagliga. Hon vísti í verki, at arbeiðið við teimum veiku næmingunum krevur nógv av tí einstaka. Ikki bert í samskiftinum við næmingin, men við alt umhvørvið.

Við deyða Maritu Petersens vilja vit takka henni fyri gott samstarv og vinarlag, samstundis sum vit lýsa frið yvir minni hennara.

**Starvsfelagarnir á Sernámsdeplinum**


Seymimaskinutilboð

Vit hava eitt partí av teimum vælumtóktu BERNINA seymimaskinunum, sum vit nú, meðan útsølan av meturvørum er, vilja lata 15% í avsláttri

BERNINA ACTIVA 130
Vanl. prísur 7.695,-
NÚ TILBOÐ kr. 6.540,00

BERNINA ACTIVA 140
Vanl. prísur 8.395,-
NÚ TILBOÐ kr. 7.135,00

BERNINA VIRTUOSA QE 150
Vanl. prísur 10.295,-
NÚ TILBOÐ kr. 8.750,00

BERNINA 160 PLUS
Vanl. prísur 12.295,-
NÚ TILBOÐ kr. 10.450,00

Nýtið høvi at ogna tær eina góða og álítandi seymimaskinu til ein sámuligan prís.



Komið inn og royn tær ella biði um brochurir

SP/F MARJUN HEIMÁ

C. Ployensgøta 4 • 100 Tórshavn
Tel. 31 25 31 • Fax 31 23 19